FK j. nr. 21/00613-32

# Reglugerð fyri kirkjugarðarnar í Fuglafirði og á Hellunum

Við heimild í Norsku Lóg nr. 9 frá 15. apríl 1687, 2-21-65 og 66 viðvíkjandi kirkjum og kirkjugørðum og Lóg nr. 128 frá 28. apríl 1916, om afstaaelse af Grund til Kirker og Kirkegaarde, verða hesi viðurskifti ásett í reglugerð.

## Kapittul 1
## Ognarrættur

**§ 1.** Kirkjugarðarnir í Fuglafirði og á Hellunum eru ogn hjá Fuglafjarðar kommunu.

## Kapittul 2
## Kirkjugarðsnevndin

**§ 2.** Kirkjugarðsnevndin hevur umsjón við kirkjugørðunum í Fuglafjarðar kommunu; og hevur ábyrgd av, at ásetingarnar í reglugerðini verða hildnar. Kirkjugarðsnevndin ger tilmæli í øllum málum, sum hava við kirkjugarðarnar í Fuglafirði og á Hellunum at gera.

*Stk. 2.* Kirkjugarðsnevndin er samansett við 5 limum, sum eru; ein limur úr teknisku nevnd, ið eisini er formaður í kirkjugarðsnevndini, ein limur úr orku- og umhvørvisnevndini, einum umboði fyri kirkjuráðið, einum umboði fyri Siloa, og einum umboði fyri Bønhúsið á Hellunum. Ábyrgdarhavandi starvsfólk á gartnaradeildini er skrivari í kirkjugarðsnevndini.

*Stk. 3.* Formaðurin í kirkjugarðsnevndini skipar fyri, at viðtøkur á fundi verða skrivaðar í gerðabók, sum Fuglafjarðar kommuna eigur.

## Kapittul 3
## Kirkjugarðsbók og -tekning

**§ 3.** Kirkjugarðsbøkur fyri Fuglafjørð og Hellurnar verða førdar í tveimum eintøkum samsvarandi tekningum yvir kirkjugarðin.

*Stk. 2.* Ábyrgdarhavandi starvsfólk á gartnaradeildini hevur og førir kirkjugarðsbøkurnar, har eitt eintak er tøkt á kommunuskrivstovuni.

*Stk. 3.* Ábyrgdarhavandi starvsfólk á gartnaradeildini førir talgildu kirkjugarðsbókina á heimasíðu kommununnar.

*Stk. 4.* Ábyrgdarhavandi starvsfólk á gartnaradeildini tryggjar minst eina ferð um árið, at tað er samsvar millum bók og tekningar, soleiðis at møgulig mistøk verða rættaði.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

*Stk. 5.* Í kirkjugarðsbókina verða skrivaði hesi viðurskifti:

- Nummar á grøvini
- Navn og dagfesting á teimum fólkum, sum eru jarðaði
  Staðseting, deild og røð
- Navn festarans
- Allar avtalur og viðkomandi upplýsingar um gravstaðið annars

*Stk. 6.* Fuglafjarðar kommuna eigur kirkjugarðsbøkurnar og tekningarnar.

## Kapittul 4
## Friðing av kirkjugarði

**§ 4.** Um ætlanin er at friða kirkjugarðin, so skal málið leggjast fyri kirkjugarðsnevndina til ummælis og býráðið til samtyktar.

## Kapittul 5
## Ábyrgdarhavandi starvsfólk

**§ 5.** Í samráði við tekniska leiðaran, tilnevnir leiðslan á gartnaradeildini eitt starvsfólk til at hava ábyrgd av kirkjugørðunum og at føra kirkjugarðsbøkurnar.

*Stk. 2.* Ábyrgdarhavandi starvsfólk hevur sítt dagliga virksemi á gartnaradeildini, og hevur tilvísing til býargartnaran. 

*Stk. 3.* Ábyrgdarhavandi starvsfólk hevur dagligu fyrisiting og ábyrgd av kirkjugørðunum í kommununi, og í hesum sambandi, at viðlíkahalda kirkjugarðarnar, og tryggja, at alt arbeiðið í kirkjugørðunum verður gjørt til lítar, eisini við atliti at jarðarferðum.

*Stk. 4.* Rakstraruppgávurnar í kirkjugørðunum ger ábyrgdarhavandi starvsfólk saman við gartnara- og vegadeildini.

*Stk. 5.* Kirkjugarðsnevndin kann ráðføra seg við ábyrgdarhavandi starvsfólk um øll viðurskifti, sum hava við kirkjugarðarnar at gera.

## Kapittul 6
## Jarðarferðin

**§ 6.** Tá ið jarðarferð er, ella urna skal gravsetast, skal skjótast gjørligt boðast frá til ábyrgdarhavandi starvsfólk, í minsta lagi 2 dagar áðrenn jarðarferðina.

*Stk. 2.* Ábyrgdarhavandi starvsfólk tryggjar, at gravstaðið verður staðsett, og at grøvin verður grivin og tyrvd. Grevstur og tyrving verður gjørt av starvsfólki á vegadeildini, nevndur gravari.

Í samráði við ábyrgdarhavandi starvsfólk, ger leiðslan á vega- og gartnaradeildini eina arbeiðsskipan í sambandi við grevstur og tyrving av grøvum. Tekniska deild verður kunnað um arbeiðsskipanina.

*Stk. 3.* Jarðarferðin skal enda so stundisliga, at gravarin og ábyrgdarhavandi starvsfólk kunnu gera sítt arbeiði liðugt á grøvini, áðrenn dagurin gongur undan.

*Stk. 4.* Ábyrgdarhavandi starvsfólk eigur, við jarðarferð, at tryggja sær, at jarðarferðarmyndugleikin, ið er sóknarpresturin, sum førir kirkjubøkurnar, hevur fingið deyðsváttanina, og er kunnaður um jarðarferðina. Hetta er eisini galdandi fyri fólk, sum ikki eru limir í fólkakirkjuni.

## Kapittul 7
## Gravstaðið

**§ 7.** Ein vaksnamannagrøv skal vera minst 1 m x 2,20 m. Ein barnagrøv minst 0,6 m x 1,25 m, ein dupultgrøv minst 2,00 m x 2,20 m, og ein grøv til at gravseta urnu í, skal vera minst 1,00 m x 1,00 m. Loyvt er at gravseta urnu, har grivið er frammanundan.

*Stk. 2.* Eftirsitandi kunnu útvega sær pláss við gravstaðið, við at venda sær til ábyrgdarhavandi starvsfólk. Eingin, sum hevur vissað sær grøv ella pláss til urnu, kann lata øðrum tað, uttan við samtykki frá ábyrgdarhavandi starvsfólki.

*Stk. 3.* Kista hjá maka, ella øðrum, kann verða sett omanyvir aðra, men skal áskotið altíð verða minst 1 metur niður á kistulokið. 

*Stk. 4.* Friðingarskeiðið (tey árini, ein grøv skal vera órørd, frá tí at jarðað er) er fyri vaksnamannagrøv 30 ár, og fyri barnagrøv (til 12 ára aldur) 20 ár.

## Kapittul 8
## Festi av gravstaði – festibræv

**§ 8.** Festibræv skal skrivast til hvørja grøv, og festarin skal seta seg í samband við umsitingina hjá Fuglafjarðar kommunu, sum skrivar festibrævið í samráð við ábyrgdarhavandi starvsfólk. Festibrævið skal vera í tveimum eintøkum, har festarin fær annað eintakið, og kommunan hitt.

*Stk. 2.* Festibrævið ásetir, hvørji rættindi og skyldur festarin hevur við atliti til at umsita gravstaðið.

*Stk.3.* Eingin kann festa sær fleiri gravir.

*Stk. 4.* Eingin grøv kann verða burturfest longur enn 100 ár.

*Stk. 5.* Verða eikkistur brúktar, ella kistur úr øðrum tilfari, sum heldur líka leingi ella longur, má grøvin verða friðað minst 2 friðingarskeið (60 ár). Av tí at zink-kistur, ið av og á verða nýttar til flutning, eru dálkandi fyri umhvørvið, skulu hesar ikki nýtast til gravseting.

*Stk. 6.* Tíðarskeiðið, sum grøv verður fest ella endurnýggjað, roknast at byrja frá tí degi jarðarferðin hevur verið, ella frá tí degi søkt verður um endurnýgging. Verður ikki søkt um endurnýgging, fellur gravstaðið aftur til kirkjugarðin.

*Stk. 7.* Tá ið tíðin fyri festibrævinum er um at vera runnin, skal festarin fáa boð frá ábyrgdarhavandi starvsfólki um hetta minst 3 mánaðir frammanundan.

*Stk. 8.* Eingin, sum hevur fest sær eina grøv, kann lata øðrum hana uttan samtykki frá ábyrgdarhavandi starvsfólki.

## Kapittul 9
## Umsiting av gravstaði

**§ 9.** Festarin hevur skyldu til at røkja gravstaðið (leiðið) væl, eisini gravsteinar, í samráði við ábyrgdarhavandi starvsfólk, soleiðis at gravstaðið er virðiligt, og fellur væl inn í heildina í kirkjugarðinum.

*Stk. 2.* Um so er, at onnur enn tey avvarðandi verða sett til at halda gravstaðið, hava hesi skyldu til at ansa eftir, at reglugerðin fyri kirkjugarðin verður hildin.



*Stk. 3.* Ikki er loyvt, at planta høgan vøkstur, heldur ikki trø ella annan vøkstur, sum kan breiða seg út yvir onnur gravstøð, uttan við loyvi frá ábyrgdarhavandi starvsfólki.

*Stk. 4.* Merkissteyrar á gravstøðum skulu ikki flytast, uttan við loyvi frá ábyrgdarhavandi starvsfólki.

*Stk. 5.* Loyvt er hjá avvarðandi at seta gravstein, sum í mesta lagi er 60 cm. høgur, á gravstaðið, kantsteinar og hálvsirklar, uttanum grøvina, eins og loyvt er at planta botnplantur, sum kunnu prýða gravstaðið.

*Stk. 6.* Um gravstaðið ikki verður hildið í 1 ár, ella gravsteinur og planting á gravstaðnum er misrøkt, kann kommunan, við tilmæli frá ábyrgdarhavandi starvsfólki, og í samráð við avvarandi, rudda og snøgga gravstaðið fyri festarans rokning. Gjaldið verður ásett av kirkjugarðsnevndini.

*Stk. 7.* Um fólk brúka amboð hjá kirkjugørðunum at arbeiða við á gravstaðnum, skulu amboðini verða løgd aftur har, sum tey eiga at liggja.

*Stk. 8.* Gamlir kransar og annað grønt tilfar, sum verður ruddað av einari grøv, skal burturbeinast í bingju til grønt burturkast, sum er staðsett í ella við kirkjugarðin. Annað tilfar, ið ikki er grønt, skal í vanligt ruskílæt. Kransar o.a. frá sjálvari jarðarferðini, verða burturbeindir av kommunalum starvsfólkum.

## Kapittul 10
## Gravsteinur

**§ 10.** Gravsteinur kann setast á grøvina minst 1 ár aftaná at tann deyði er grivin. Gravsteinurin skal verða settur á góðan sokkil, sum er í mesta lagi 100 cm. langur, og gravsteinurin skal ikki verða hægri enn 60 cm. Gravsteinurin skal verða settur 15 cm. inn frá aftara kanti á gravstaðnum.

*Stk. 2.* Áðrenn gravsteinur verður settur upp, ella kantur skal gerðast uttan um grøvina, skal umsókn við strikumynd, grøvnr. og áskrift sendast kirkjugarðsnevndini til góðkenningar. Festarin, ella tann avarðandi, hevur alla ábyrgdina av gravsteininum og uppsetan av hesum; Um gravsteinurin skuldi koppað, so endurrindar kommunan ikki tílíkar skaðar.

*Stk. 3.* Nummarspjaldur og peli eru ogn hjá kommununi, men sjálvt nummarspjaldri kann takast av og setast á gravsteinin ella annað, um avvarðandi ynskja tað, og í samráði við ábyrgdarhavandi starvsfólk.

## Kapittul 11
## Kirkjugarðsfriður

**§ 11.** Kirkjugarðarnir eru vígdir friðstaðir, sum eingin má órógva ella gera seg inn á.

*Stk. 2.* Vitjandi skulu lata portrini væl aftur eftir sær, og tað skal bara verða gingið á kirkjugarðsgøtunum og har, ið ikki er jarðað, um hetta er gjørligt.

*Stk. 3.* Smábørn eiga ikki at vera í kirkjugørðunum uttan saman við vaksnum persónum, sum hava ábyrgdina av teimum. Børn mugu ikki spæla í kirkjugørðunum.

*Stk. 4.* Hundar skulu verða í bandi, og fenaður má ikki koma í kirkjugarðin.

## Kapittul 12
## Kæra

**§ 12.** Kæra í sambandi við avgerð, sum er tikin av ábyrgdarhavandi starvsfólki ella kommunalu umsitingini, kann umvegis kirkjugarðsnevndina leggjast fyri Fuglafjarðar býráð til endaliga støðutakan.

*Stk. 2.* Kæra sambært stk. 1 skal sendast kirkjugarðsnevndini.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**Kapittul 13**

**Dagføring**

**§ 13.** Møgulig dagføring av hesari reglugerð, skal umvegis kirkjugarðsnevndina til ummælis og leggjast fyri Fuglafjarðar býráð til góðkenningar.

**Kapittul 14**
**Eftirmeting**

**§ 14.** Reglugerðin skal eftirmetast í seinasta lagi 1. juli 2023.

**Kapittul 15**
**Gildiskoma**

**§ 15.** Reglugerðin, sum er samtykt av Fuglafjarðar býráð á fundi tann 24. februar 2022, fær gildi tann 1. mars 2022.

Fuglafjørður, 25. februar 2022



Dávur Juul, borgarstjóri

Henrik Weihe Joensen, kommunustjóri